# Barnaansing ein stórur trupulleiki



Savnsmynd

**Umleið 120 børn standa á bíðilista til dagstovn ella dagrøktarpláss í Klaksvíkar Kommunu, og hjá onkrum er bíðitíðin upp til næstan tvey ár ella longri, áðrenn teirra børn sleppa undir kommunalu ansingarskipanina**

BARNAANSING
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Tað er ikki stuttligt at vera foreldur í Klaksvíkar Kommunu, um tú eftir farloyvi skalt aftur til arbeiðis, tí tørvurin á ansingarplássum er sera stórur, og ongin loysn tykist at vera í eygsjón.

Tað verður arbeitt við at gera ein útibarnagarð úti í Grøv, sum eftir ætlan letur dyrnar upp í august. Hesin útibarnagarður er til tey elstu børnini á bíðilistanum og tey elstu børnini í dagrøktarskipanini. Hetta verður sjálvandi gjørt fyri at fáa tey børnini, sum hava staðið longst á listanum á stovn. Og alt gott um tað. Víðari ger tað so, at tað verða nøkur pláss tóm hjá dagrøktarunum, men fleiri foreldur hava longu nú fingið at vita, at teirra barn kortini ikki sleppur inn fyrr enn august næsta ár. Til ta tíð eru børnini blivin tvey ár ella eru líka við at fylla. Sostatt er bíðitíðin hjá summum upp til tvey ár. Meðan hon hjá øðrum er nógv styttri.

Tað er ilt at siga, hvussu børnini verða "vald". Summi foreldur siga, at tá tey hava spurt seg fyri, so verður sagt frá dagrøktarskipanini í Klaksvík, at tað verður gingið beint eftir bíðilistanum, meðan onnur siga, at tey hava fingið at vita, at tað verður fyrst hugt eftir tørvinum hjá stovnunum, dagrøktarunum og í einstøkum førum hjá foreldrunum. Tað vil siga, um tað skal verða ein genta ella drongur og í hvørjum aldri, tey skulu vera í.

### Fáa onki at vita

Summi foreldur, sum Sosialurin hevur tosað við, fílast á, at tey ikki fáa nakað at vita. Tey siga, at tey hava spurt og spurt, men tað verður bert tosað tær eftir munninum, og onki hendir.

Nógvar søgur ganga eisini um, hvussu ein eigur at gera fyri at fáa barn sítt inn. Onkur siga, at man skal tosa við stórum bókstavum og skriva brøv, tosa við politikarar og gera vart við seg allatíðina, meðan onnur siga, at júst slíkur atburður gevur bakslátttur – at um tú sum foreldur rópar ov hart, so verður barn títt sett aftur um á listanum. Ivasamt er í øllum førum um, hvussu nógv er í hesum, tí slatur er altíð nóg mikið av.

Onkur foreldur hava sum sagt tosað við fleiri politikarar. Ein av teimum hevur úttalað seg um, at úti við ein triðingur av børnunum í kommunalu ansingarskipanini eru komin inn gjøgnum sosialu deild. Tað vil siga frá barnaverndarnevndini.

- Um hetta er so, hava vit ein álvarsligan trupulleika í Klaksvík, ella gera fólk sær dælt av barnaverndini, halda foreldur, sum ikki fáa teirra barn inn á stovn í ár.

Summi foreldur eru heilt illa fyri, og annar parturin má so vera heima, inn til barnið sleppur inn. Nógv finna sær aðrar loysnir, men tað er ongin loyna, at tað tryggasta er eitt ansingarpláss innan fyri kommunalu skipanina. Um ein dagrøktari eitt nú gerst sjúk ella má hava frí, so veitir dagrøktin eitt annað pláss til títt barn at vera í, meðan hin er burtur. Men tað er tað so ongin trygd fyri, um ikki barnið er undir kommunalari ansing. Tað er eisini dýrari at hava privata dagrøkt, um tað kann kallast so.

### Rættvíst og trúverdugt

Sigrun Vágstún , dagrøktar leiðari í Klaksvíkar Kommunu, skilir væl foreldrini, at tey eru um at ganga frá verðini, tí tey ikki fáa sítt barn inn.

- Men eg kann bara siga, at vit gera tað, vit kunnu og tað er sera torført, tá tað ikki eru fleiri pláss enn tað sama.

Í viðmerking til, um tað verður gingið eftir bíðilistanum ella ikki, sigur Sigrun, at tað finnast upptøkureglar, sum gingið verður eftir, tá eitt barn skal inn.

- Nú kann eg einans tosa fyri dagrøktina, men tá ein dagrøktari manglar eitt barn, so hyggi eg eftir, hvat fyri bólk av børnum hon hevur frammanundan, og so verður tað nýggja barnið valt út eftir teimum kriterjunum. Tí tað er givið, at tað er jú barnið tað snýr seg um, og so má man gera alt fyri at vissa sær, at hetta barnið kemur at trívast í dagrøktini.

Tá eg so havi funnið út av hvønn aldursbólk hetta barnið skal hoyra til, so sigi eg samskiparanum av bíðilistanum frá, at eg til dømis mangli ein drong frá oktober 2000. So fer hon í bíðilistan og tann fyrsti drongurin, sum líkur hesi kriteriur á bíðilistanum sleppur so inn, greiðir Sigrun frá.

- So gingið verður so at siga eftir bíðilistanum. Bara soleiðis at skilja, at tað verður gjørt í samráð við stovn ella dagrøktara. Og so sleppur tað barnið inn, sum hevur tørn. Men um nú heilsusystirin ella barnaverndin heitir á okkum, um at loyva einum barni inn, orsakað av at vælferðin hjá tí er hótt ella líknandi, so taka vit sjálvandi tað til eftirtektar, sigur Sigrun, sum tó ikki hevur nakað innlit í, hvussu stórur partur av børnunum, sum eru í skipanini eru komin undir ansing gjøgnum sosialu deild.

- Vit royna í øllum førum at gera okkara arbeiði soleiðis, at tað skal kunna vera rættvíst og trúverdugt, sigur Sigrun, sum vísir á, at tað er komið meiri enn so fyri, at tey børn, sum eru sloppin inn, uttan at tað hevur verið tikið hensyn til, hvat fyri børn eru í dagrøktini frammanundan, ikki trívast, har tey eru.

- Og hvat hendir so? So koma foreldrini aftur, tí tað riggar ikki, har barnið er, og so eru vit í somu støðu aftur – um ikki verri.

---

Eyðgunn Samuelsen um barnaansingartrupulleikan í Klaksvík:

# Vit arbeiða við fullari ferð við málinum

**Vit arbeiða í móti at tað skula verða 60 pláss í nýggja útibarnagarðinum, sum letur upp fyrst í august mánaða. Søkt er eftir leiðara til barnagarðin, men enn hevur ongin pedagogur søkt, sigur Eyðgunn**

BARNAANSING
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Eyðgunn Samuelsen er formaður í sosialu nevnd í Klaksvíkar Býráð. Hon sigur, at tey arbeiða av øllum alvi við trupulleikanum. Og nú kunnu foreldur í Klaksvík kanska hóma ein glotta fyri framman. Tí tann nýggi útibarnagarðurin úti í Grøv fer at geva nøkur pláss í dagrøktini, tá tey elstu børnini, sum í dag framvegis eru í dagrøkt, fara í barnagarð. Og tað sær eisini út til, at tað fara at verða pláss til fleiri børn í útibarnagarðinum enn tað í fyrstuni varð ætlað. Útibarnagarðurin skuldi av fyrstan tíð taka í móti 40 børnum, men tað verða helst pláss fyri 60. Og Eyðgunn sigur, at tað verður arbeitt hart við at fáa tað talið upp á 80 nýggj pláss í ár, men enn mangla nøkur viðurskifti at koma upp á pláss, áðrenn hon kann siga tað við vissu.

- Men hetta skuldi í øllum førum givið nøkur pláss aftur at í ár, heldur Eyðgunn.

Í viðmerking til at ein politikari hevur úttalað seg um, at tað er umleið ein triðingur av børnunum í skipanini, sum eru komin inn í gjøgnum barnaverndarnevndina sigur Eyðgunn fyrst av øllum, at tað er harmiligt, at ein politikari úttalar seg soleiðis um eitt mál, sum er so eymt, sum barnaansingin í løtuni er í Klaksvík. Hon heldur eisini, at viðkomandi skuldi heldur traðka fram í nevndini við slíkum útsøgnum í staðin fyri at fara út við tí uttan haldgóð prógv. Men hon sigur eisini samstundis, at um so var, so kann man staðfesta beinanvegin, at so hava vit ein stóran trupulleika í Klaksvík.



*- Vit miða í móti at nýggi útibarnagarðurin skal kunna hýsa 80 plássum, og tað skuldi givið nøkur pláss aftur at í ár, heldur Eyðgunn Samuelsen, formaður í sosialu nevnd í Klaksvíkar býráð*

- Ongi neyv hagtøl eru um hetta, men vit fara seinni í ár at kanna um nakað hald er í hesum, sigur Eyðgunn.

Men hon veit at siga, at tað í veruleikanum ikki er talan um ein so stóran part av børnunum, sum eru komin inn gjøgnum barnaverndina.

- Tað passar, at onkur í sosialu nevnd hevur sett spurningin um tað ikki vóru ov mong børn, sum høvdu serligan tørv, men tað var als ikki tí at talan var um ein triðing.

So vit spurdu okkum fyri á sosialu deild og fingu nágreinilig dømi upp á hvat tað vóru fyri trupulleikar talanin var um. Og tað vísti seg í hvørjum tí einasta dømi, at tað var serligur tørvur. Tað vil siga, at tað var als ikki talan um at nakar gjørdi sær dælt av, at biðja barnaverndarnevndina um at veita teirra barnið ansing, sigur Eyðgunn, sum undirstrikar, at tað eru ongi viðurskiftir, sum kunnu byggja undir, at tað eru fleiri børn við serligum tørvi í Klaksvík enn aðrastaðni.

- Tá ið eitt barn verður ávíst av barnaverndina er ein faklig viðgerð farin fram og hana hava vit sum leikfólk ikki haft orsøk til at seta spurnartekin við.

### Serligur tørvur framíhjárætt

Hon vísir eisini á, at hesi børn eisini noyðast at bíða longi eftir einum plássi, tí trupulleikin er manglandi pláss til øll børn og tá ið fólk eru í neyð fokusera tey kanska uppá onnur ting eisini .

Jancy B. Klein, leiðari á sosialu deild í Klaksvíkar Kommunu, vísir harðliga aftur pástandinum um, at ein triðingur eru børn, sum eru komin inn í gjøgnum barnaverndina.

- Tað er onki hald í hasum pástandinum. Børn við serligum tørvi koma altíð í gjøgnum barnaverndina, men tað er so slettis ikki talan um ein triðing. Tað passar ikki, staðfestir Jancy.

- Vit fáa javnan børn við serligum tørvi, og eisini tey noyðast at bíða eftir plássi, men tá vit fáa eina áheitan frá barnaverndarnevndini, so verða hesi børn, sambært upptøkureglunum her, tikin fram um, sigur hon, og vísir á, at tað í upptøkureglunum stendur, at børn við serligum tørvi hava framíhjárætt. Og tað hava tey eisini sambært upptøkureglum aðrastaðni eitt nú í Tórshavn.

Tær báðar, Eyðgunn og Jancy halda, at alt hetta kemur av tí sama. Tørvurin í kommununi er so stórur, og foreldur eru uppøst og frá sær sjálvum, tí tey ikki fáa børnini passaði. Og so koma nógvar søgur fram um eitt og annað.

Eyðgunn vísir eisini á at tey fíggjarligu fríplássini, men tey hava onki við barnaverndarnevndina at gera. Tey eru ætlað teimum sum ikki hava fíggjarligar karmar til at gjalda fyri eitt ansingarpláss. Sum oftast eru tað einligar mammur, sum eru farnar undir útbúgving ella skúlagongd, sum søkja um fríplass.

Eyðgunn sigur, at tað í ár eru avsettar 600.000 krónur til fríplass. Hetta er eitt tal, sum tey eru komin til út frá árinum í fjør. Kommunan hevur onga ávirkan á hvør fær hesi fríplássini, tað er landið ið ásetir hvussu lítil inntøkan skal vera fyri at fáa fríplass.

Til eitt ansingarpláss gjalda foreldur 30 % og kommunan 70 % av kostnaðinum.



# Bent vann ferðina hjá HTH til Hotel Legoland

**Familian, sum vann ferðina hjá HTH fyri tvey vaksin og tvey børn, var fyri eldsbruna síðst í desember í fjør - júst, tá ið tey høvdu pyntað til jóla. Húsini fórust øll, sum tey vóru, og alt mátti byggjast upp av nýggjum. Eftir tógvið stríð, eru tey nú flutt innaftur**

VINNINGUR
*Vilmund Jacobsen*



*Heima í tí nýggja HTH køkinum hjá Bent Berg & Maud Heinesen, sum vunnu ferðina. Tey vórðu sera fegin, tá ið Vinjard Johansen, leiðari á Køksmiðstøðini, vitjaði tey við tí yvirraskilsi at tey høvdu vunnið eina ferð fyri 2 vasksin og 2 børn til Legoland*

Í samband við, at HTH fylti 25 ár, og Køksmiðstøðin læt upp stóra íbyrtandi nýggja framsýning, varð skipað fyri kapping um eina vikuskiftisferð við uppihald fyri tvey vaksin og tvey børn á Hotel Legoland í Danmark.

Á Køksmiðstøðini siga tey, at handilin varð nógv vitjaður, meðan kappingin fór fram. Fyri at luttaka í hesi kappingini, sum var ein sonevnd spurnarkapping, skuldi tú fylla út eitt spurnarblað um ymiskt viðvíkjandi keypi og køkum.

- Nógv fólk nýttu høvi at fylla út spurnarblaðið, og tá ið tíðin var úti, kom Henrik Winther, útflutningsleiðari hjá HTH í Danmark, upp til Føroya at draga vinningin, sigur Rakul Guðjónsson.

Nakað av fólki hevði leitað sær niðan í handilin hendan dagin, drigið varð. Niklas Joensen, sum starvast hjá Rassmussen & Weihe varvið fyri at tryggja, at alt fór rætt fram.

### Bent vann ferðina

Tá ið úrslitið av kappingini fyrilá, vísti taðseg, at hepni vinnarin gjørdist Bent Berg í Havn.

- Fyrst ringdu vit til hansara og avtalaðu at koma oman í Sornhúsgøtu 6 við vinnara diplominum. Bent gjørdist, sum vera man, sera bilsin, tí, sum hann segði: "Eg vinni ongantíð…"

- Bent trúði næstan ikki sínum egnu oyrum, sigur Rakul og heldur fram:

- Hann segði seg hava fylt spurnarblaði út til stuttleika, tá ið tey vóru til morgunbuffet í Køksmiðstøðini, tá ið nýggja framsýningin læt upp.

Men satt var; Bent gjørdist tann hepni vinnarin av hesi ferðini fyri tvey vaksin og tvey børn til Hotel Legoland.

### Húsini brendu

Bent og konan, hann livir saman við, Maud, vóru so óheppin í desember síðsta ár, at eldur kom í húsini beint fyri jól, tá ið alt var pyntað til jólar. Húsini fórust øll av eldsbrunanum, og alt mátti byggjast upp av nýggjum. Hetta hevur verið strævið og hevur tikið nógva tíð. Tey eru núst aðni flutt innaftur í húsini at búgva.

- Familjan var sera blíð, tá ið Køksmiðstøðin kom á vitjan. Tey bjóðaðu kaffi, og áhugavert var at síggja "nýggju" húsini, sigur Rakul.

Bent og Maud hava køk á loftinum og í kjallaranum, og hettaeru køkar, tey hava keypt frá Køksmiðstøðini, haðani tey eisini hava keypt annað innbúgv, eitt nú klædnaskáp.

- Vit halda, at tað var fantastiska stuttligt, at júst Bent Berg skuldi vinna ferðina til Hotel Legoland, sigur Rakul Guðjónsson á Køksmiðstøðini.

## Framdu veiðieftirlit við bryggju í Sørvági

**- Trupulleikin við óforsvarligum skipsstigum hevur ofta verið umrøddur á fundum við Vaktar-og Bjargingartænastuna, sigur Færøernes Kommando, sum fýlist á, at fleiri skip hava ov vánaligar skipsstigar**

FISKIVEIÐIEFTIRLIT
*Vilmund Jacobsen*

Mánadgin, 10. juni, bað danska vaktarskipið, Veðrurin, norska línubátin, Urvaag, um at sigla á Sørvág, tí veiðieftirlit skuldi fremjast, meðan skipið lá við bryggju.

Færøernes Kommando sigur, at áheitanin um at sigla í havn, stóðst av, at eftirlitsliðið hjá Veðrinum ikki slapp forsvarliga umborð á Urvaag, tí skipsstigin var í so vánaligum standi.

Tað tók eftirlitsliðnum ein tíma at kanna veiði og fiskireiðskap, og tá ið eftirlitið var liðugt, kundi Urvaag loysa og fara aftur til fiskiskap.

Sambært fiskaríleiðaranum hjá Færøernes Kommando, er tað ikki so sjáldan, at skipsstigin er í ov vánaligum standi.

- Tí hevur hesin trupulleiki ofta verið umrøddur á fundum við Vaktar-og Bjargingartænastuna, sigur Færøernes Kommando.

### Eftirlitið sleppur ikki umborð

Eingi skip - hvaðani tey enn eru - hava loyvi til at sleppa sær undan eftirliti, tí skipsstigin er so vánaligur, at eftirlitsliðið ikki sleppur trygt umborð.

- Tí hava Vaktar-og Bjargingartænastan og Færøernes Kommando - við góðkenning frá fútanum - avgjørt í størri mun at gera nýtslu av løgtingslóg, nr. 28, grein 35, har heimild er at biðja fiskiskip sigla í havn til nærri eftirlit, sigur Færøernes Kommando.

---

# Lítið fæst burtur úr smáa upsanum

**- Vit hava maskinur til smáan fisk, men tað skal valdast, hvussu smáur fiskurin kann vera, sum fer ígjøgnum maskinurnar, sigur Jason Johannesen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Mánadagin landaði Vestmenningur í Saltangará. Teir høvdu 130.000 pund, harav sløk 100.000 var upsi, sum Fiskavirking í Saltangará keypti. Restin av veiðini var toskur og onnur fiskasløg, sum onnur virki keyptu.

Hvussu hendan vikan annars verður, visti Jason Johannesen, virkisleiðari, ikki at siga, tá ið vit frættu mikudagin, men aftrat fiskinum hjá Vestmenningi, hevur virkið keypt 20.000 pund av upsa frá Kúrbergi, sum landaði á Toftum og 50.000 pund av upsa frá Beta.

- Men hetta røkkur ikki longur enn til hálvan hósdagin. Fæst eingin fiskur fyri ta tíð, verður ein steðgur í framleiðsluni. Men nú fáa vit at síggja, hvussu verður, segði Jason, sum annars fýlist á vánaliga summarveðrið hesar seinastu dagarnar.

### Lítið burturúr

Virkisleiðarin sigur, at ein stórur partur av veiðini hjá Vestmenningi var upsi 4, og nakað var eisini av upsa 5, sum er stórseiður.

- Eg vil siga, at upsin var smáur í fjør, men hann er nógv smærri í ár.

Jason sigur, at Fiskavirking í Saltangará, sum er eitt upsavirki burtur av, hevur trupulleikar við tí smæsta fiskinum, tí hann er so ógvuliga smáur, og torført er at fáa nakað burtur úr honum.

- Vit hava maskinur til smáan fisk, men tað skal valdast, hvussu smáur fiskurin kann vera.

Skemtandi tekur hann til, at ein partur av tí smæsta, sum fer í maskinurnar, ongantíð kemur útaftur.

- Er fiskurin bæði smáur og kanska bleytur, er lítil dugur í honum, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari.



*Upsin er ógvuliga smáur, og torført er at fáa nakað burtur úr honum. Á Fiskavirking í Saltangará verður turt gólv á middegi í dag, um eingin fiskur kemur aftrat hesa vikuna.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*